## Vit løna Madrid aftur

Tvær milliardir krónur. Tað er prísurin, sum Real Madrid hevur goldið fyri Kaká í AC Milan og Cristiano Ronaldo í Manchester United. Men felagið fær pengarnar aftur, sambært Kaká. – Vit fara at løna felagnum aftur. Vit eru pengarnir verdir. Tað hava vit prógvað á vøllinum seinastu árini, sigur Kaká í spanska blaðnum Marcea. Raul Albiol og Karim Benzema eru somuleiðis nýggir í leikarahópinum hjá Real Madrid.



## Zlatan verður í Inter

Einki felag tykist vera til reiðar at rinda prísin, sum Inter krevur, um teir skulu selja Zlatan Ibrahimovic. Tað ljóðaði annars, at Manchester United, Barcelona og Real Madrid høvdu áhuga í at keypa Ibrahimovic, men nú sigur forsetin í Inter, at sviin ikki fer nakran veg. Massimo Marratti, forseti í Inter, segði, at var prísurin tann rætti, vóru teir til reiðar at selja. Sjálvur metti hann, at rætti prísurin var 70 milliónir evrur, svarandi til 521 milliónur krónur, men hesa upphædd er einki felag til reiðar at rinda, skilst.

# Páll Fangi fyri fyrstu ferð í átta ár



*Sigurin hjá Páll Fanga var merkisverdur á tann hátt, at hetta var fyrsta ferðin síðani 2001, at Páll Fangi hevur vunnið hesa kappingina*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen / Einslistir*

**Burtursæð frá í tveimum róðrum so hava tað síðani 2001 bara verið bátar í høvuðsstaðnum, sum hava vunnið kappróðrarnar millum 6-mannafarini við kvinnum**

6-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eftir at Gongurólvur næstsíðsta leygardag hevði vunnið á Varmakeldu, varð tað undir yvirskriftini Søgan skal ikki endurtaka seg mint á, hvussu tað gekk, tá ið Gongurólvur vann FM í 2003. Ta ferðina vann kvinnu báturin hjá Havnar Róðrarfelag teir fyrstu fimm róðrarnar, og tað var nóg mikið til at vinna FM. Í tveimum teimum síðstu róðrunum tapti Gongurólvur. Á Vestanstevnu var Jarnbardur fremstur, Páll Fangi næstfremstur og Gongurólvur var nummar trý, og á Ólavsøku var Gongurólvur aftanfyri Jarnbard, sum vann.

Sjálvandi ætlaðu tær á Gongurólvi ikki, at gongdin frá 2003 skuldi verða endurtikin í ár. Men í Sandavági leygardagin gekk tað nett soleiðis, sum tað gjørdi fyri seks árum síðani. Hesa ferð var tað Páll Fangi, sum vann, Jarnbardur var næstfyrstur, og Gongurólvur endaði á – sum í 2003 – triðja plássi!

Gongurólvur er framvegis stórur FM favorittur. Spurningurin er, um tað fer at ganga soleiðis á Ólavsøku, sum tað gjørdi í 2003, tá ið Gongurólvur tók ímóti FM skreytinum, meðan annar bátur – ta ferðina var tað Jarnbardur – fór við ólavsøku gullinum.

Hesa ferð var sigurin hjá Páll Fanga sannførandi, hóast tað fyrsta partin av teininum einki var, sum bendi á, at Páll Fangi skuldi fara at vinna. Starturin hjá klaksvíkskvinnunum var einki serligur, og eina løtu vóru tær aftanfyri Jarnbard, Gongurólv og Hvessing.

Men so rørdi Páll Fangi rættuliga upp á seg, og tað leið heilt væl eftir. Jarnbardur og Páll Fangi tosaðust eina løtu um oddasessin, men so glapp hjá teimum úr Klaksvík, og í endaspurtinum var tað ikki so spennandi.

Sigurin hjá Páll Fanga var merkisverdur á tann hátt, at hetta var fyrsta ferðin síðani 2001, at Páll Fangi hevur vunnið hesa kappingina. 2001 var framúr róðrarár hjá teimum í Klaksvík, og tá vann Páll Fangi allar sjey róðrarnar og harvið FM heitið.

Síðani tá hava bara bátar úr høvuðsstaðnum vunnið FM: Jarnbardur, Gongurólvur og Lómur. Úrslitini siga, at bátarnir av bygd hava ikki verið serliga eyðsýndir. Gamaní vann Riddarin úr Miðvági FM í 2006, men tað árið vann meistarin bara tveir róðrar – á Norðoyastevnu og á Eystanstevnu. Lómur vann á Sundalagsstevnu og Jarnbardur vann fýra tær seinastu ferðirnar. At tað kortini eydnaðist Riddaranum akkurát at halda Jarnbard aftanfyri seg komst av, at Jarnbardur bara varð nummar fýra í trimum teimum fyrstu róðrunum.

Í Sandavági vóru tað Páll Fanga kvinnurnar, sum fingu steyp og gullkrónur. Fleiri teirra vóru við, tá ið Páll Fangi vann FM fyri átta árum síðani. Sigurin ber mót við sær um at vinna á Ólavsøku, men stríðið um FM heitið tykist vera vunnið at Gongurólvi, sum eftir Vestanstevnu er fýra stig frammanfyri Páll Fanga. Nú er spurningurin, um ólavsøkuróðurin eisini fer at verða endurtøka av 2003, tá ið Gongurólvur seinast vann FM!

# Tær skiftast um at vinna

**Frúgvin tryggjaði góðan stevnuhýr, tá ið tær úr Miðvági vunnu á Erlu Kongsdóttir, sum vikuna frammanundan við sigri tryggjaði góðan hýr á Varmakeldu**

5-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er so spennandi undan finaluróðrinum, sum tað kann verða. Tann, sum verður fremri á Ólavsøku av Frúnni úr Miðvági og Erlu Kongsdóttir úr Fuglafirði vinnur FM í kappingini millum 5-mannafør við kvinnum.

At taka aðra manningina fram um hina sum favoritt at vinna um fjúrtan dagar ber ikki til. Gongdin higartil hevur verið skiftandi, og sum tey eru farin at siga, so verður tann meistari, sum ólavsøkuaftan rakar dagin!

Erla Kongsdóttir vann á Norðoyastevnu og Fjarðastvenu, so vann Frúgvin á Sundalagsstevnu og Jóansøku, og so hava bátarnir vunnið í heimasjógvi – Erla Kongsdóttir á Varmakeldu og nú Frúgvin á Vestanstevnu.

Hesa ferð royndi Ritan norðan úr Sundi at bjóða seg fram í startspurtinum. Men tað var skjótt, at kappingin um fremsta plássið stóð millum Erlu Kongsdóttir og Frúnna. Eina løtu var Erla Kongsdóttir fremst, men so vístu fleiri knotur seg at vera í teimum úr Miðvági. Frúgvin vísti finan endaspurt, og tað gjørdi ikki stevnuhýrin verri í Sandavági.

